


www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 07 - 2012

# Av Brugduleiðini til Havnar at skifta manning

Esvagt Connector, sum er standbyskip hjá kinesiska boripallinum Cosl Pioneer, ið borar fyri Statoil á landgrunninum, kom á Havnina í gjár fyri at skifta manning, bunkra, taka proviant og fyri at gera onkrar smávegis umvælingar. Skipið skal røkja uppgávuna sum stuðuls- og atstøðuskip (support- og standby) hjá boripallinum teir 4 til 5 mánaðirnar, sum boringin varar. Oljan.fo vitjaði umborð á skipinum, har vit hittu teir báðar donsku skipararnar, sum loystu hvør annan av. Skipið skiftir manning eina ferð um mánaðin. Reportasjan frá hesi vitjan kemur á oljuportalin ein av komandi døgunum. Mynd - Esvagt Connector á Havnini. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller